**PRIVAT GUITARUNDIRVÍSING**
í Havnini og á Skálafjørðinum. Ring ella skriva. Heri Joensen, Týr
*Tlf. 223735, heri@tyr.net*

**FORSTERKARI**
2 x 100 w og ein cd-spælari til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 229584*

**KYAIRI GUITARI**
Hondgjørdur, nýprísur 18.000 kr. Forsterkari Ibanez til kassaguitara nýprísur 4.000 kr. Lítið brúktur. Prísuppskot 15.000 samlað.
*Tlf. 509998*

**TIL SØLU**
Ein 4 str. musicman sting ray til sølu, um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 584014*

**TVØRFLOYTA TIL SØLU**
Er brúkt, men hevur nýtt munnstykki.
*Tlf. 257940*

**TIL SALG**
Højtalere Jamo D870 Concert 11 High End 3 vejs Basrefleks gulvhøjtaler 150W/200W long/short Frekvens 30-22000, vægt 32,5 kg. stk. Som nye. Pris ialt: 26.000 kr.
*Tlf. 271827*

**KOMPLETT BILANLEGG**
Til sølu við stórum avslátri. 1/2 ára gamalt JVC cd-spælari, Mosfet KD-SH9101, Super Woofari hátalarar + forsterkari + kondalisatur.
*Tlf. 265353*

## Út- & Sjónvarp

**GER KVETTI**
Ein Sony Surround Recievari og Fløguspælari til sølu fyri 16.000. Tað er uml 2 ára gamalt, óbrúkt. Nývirði á 26.000 kr.
*Ring nú á 31196466*

**PIONEER ANLEGG**
bíliga til sølu. Pioneer forsterkari, Pioneer Fløguspælari, Pioneer Equelizari í originalum Pioneer glasskápi + 2 stk. Dantax 180 Watt hátalarar + káplar. Nýprísur 14.000,- Selist fyri 8000,- Vegna keyp av sorround anleggi.
*Tlf. 254445*

**DVD-SPÆLARI**
Philips DVD-spælari við fjarstýring (alt er grátt). Sum nýggjur. Til sølu fyri 750 kr.
*Tlf. 216043*

**TIL SØLU VEGNA FEILKEYP**
Sony Surround anlegg! 80 wx 5x 100 w RMS. 500 w forsterkari. Sera gott ljóð og bassur. Nýprísur 5.000 kr. Selist fyri 4.000 kr. ella hægsta boð yvir.
*Tlf. 224311*

**DVD FILMAR TIL SØLU**
Bruce Almighty, Høj Pistolføring, Sleepy Hollow, Enemy of the State, Ali, Lethal Weapon 4, Who´s Harry Crumb,Star Trek 3 & Being John Malkovich. Kr. 99-150 pr.stk.
*Tlf. 510441*

**26" SAMSUNG SJÓNVARP**
frá 2000 og 1 United DVD frá 2003 til sølu fyri 2.500,- Lítið brúkt, fínasta slag, selist vegna flyting.
*Tlf. +45 22985516*

## Ymiskt

**SAMSUNG E700**
3 mánaðir gomul. til sølu vegna keyp av nýggjari fartelefon. Prísuppskot 2500,-.
*Tlf. +45 24650348*

**TIL SØLU**
Lítið brúkt kombinera Fax/Tlf/Tlf-svarari, typa Brother T76 til sølu fyri 600,- kr., brúkar A4 ark.
*Tlf. 225901*

**MÁLNINGAR TIL SØLU**
2 málningar av Mykines til sølu. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1912/21*

**GRILLVOGNUR TIL SØLU**
Grillvognur á 24 fermetrar við øllum tilhoyri til sølu. Vognurin er klárur at taka í nýtslu sum hann stendur.
*Tlf. 227533*

**2 BILLETTIR TIL SØLU**
Føroyar-Frakland 8. sept. 04. (Vaksin). Áhugað ringið
*tlf. 506571*

**AKVARIUM TIL SØLU**
stórt akvarium 300 ltr. við borði.
*Tlf. 315065*

**SONY ERICSSON T610**
fartelefon + stereo fm-radio handsfree + bluetooth oyramikrofon til bil, til sølu fyri hægsta boð yvir kr. 1.800,-
*Tlf. 218903*

**TELEFAX**
av merkinum Okifax OF-8m til sølu fyri umleið kr. 500,-
*Tlf. 218903*

**TIL SØLU**
Fotokopimaskina av merkinum Xerox Workcentre XE60 + eyka litpatrón til sølu fyri hægsta boð omanfyri kr. 1.000,-
*Tlf. 218903*

**KENWOOD**
stereoanlegg til sølu, forsterkari, cd-avspælari, bandavspælari, radio og 2 Dali hátalarar. Nýprísur 28.000,- Selist bíliga, gev eitt boð.
*Tlf. 215609*

**KJALLARATRAPPA**
Vinkultrappa, snarar til vinstru niður, hædd 260 cm, br. 83 cm.
*Tlf. 316692*

**SONY ERICSSON P800**
Nýprísur 5.500 kr. til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 224226/441560*

**NÝTT ÚTHÚS/SKÚRUR**
til sølu. 2,5m x 3m við høgari reising. Klárt at flyta og seta omaná fundament. Prísur kr. 19.500.
*Tlf. 582133 aftaná kl 18*

**APEX FERÐASEÐIL TIL SØLU**
á farleiðini Vágar-Kbh./Billund tur/retur á rutuni hjá Maersk Air til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 226860*

**SPV E100**
Fartelefon við windows, msn messenger, outlook, media player, spølum, programmum og mongum øðrum. Sær út sum nýggj. Við fylgir: headsett, cradle, 128 mb SD-kort, qwerty-tastatur. Nýggjasta software og uttan sim-lock. Einans 1.800 kr.
*Tlf. +45 26275314, ella mail: kd@post.olivant.fo*

**HERREUR CASIE C-801**
Ældre model, digital med bl.a. lommeregner, dato, stopur etc. Pris 200 kr.
*Tlf. 271827*

**HERREUR**
Tah Hever Monza Chronograph. Sort læderrem med hvid skive. Elegant og i flot stand i original æske. Pris 16.000 kr.
*Tlf. 271827*

**FLUTNINGUR!**
Vit flyta skjótt og bíliga. Dømi: Føroyar-DK, kr. 750 m3. Ring til Media-Trans.
*Tlf. 213223*

**LOPPUMARKNAÐUR REYÐI KROSSUR FØROYA**
Loppumarknaður verður leygardagin 25. september kl. 10.00-14.00. Í hesum sambandi taka vit fegin ímóti smálutum, góðum klæðum og skóm, opið verður í Vágsbotni nr. 9 mikukvøldini 15. og 22. sept. frá kl. 19-21.
*Reyði Krossur Føroya, tlf. 319630 / 315106*

**ROKNIMASKINA TIL SØLU**
Texas Instrument TI-83 Plus. Nýprísur 1.100 kr. Til sølu fyri 650 kr.
*Tlf. 444571 ella 504299*

**ÚTHURÐ YNSKIST TIL KEYPS**
Max. 200x90, høgra út.
*Tlf. 519782 eftir kl. 14*

**ÚTHURÐ 90X200 TIL SØLU**
Er í góðum standi.
*Tlf. 519782 eftir kl. 14*

**DUPULT FRONSK ALTANHURÐ**
Max. 2 m høg og 1,5 m br. ynskist til keyps.
*Tlf. 519782 eftir kl. 14*

**ATGONGUMERKI TIL SØLU**
1 atgongumerki til Føroyar-Frakland til sølu. Atgongumerki er til vaksin. Manglar tær eitt, so ring á
*tlf. 580300*

**TIL SØLU**
Nøkur føroysk frímerki og ársmappur til sølu.
*Tlf. 255028*

**NOKIA 6610**
til sølu vegna feilkeyp fyri kr. 1.500,- Hon hevur kamera og radio.
*Tlf. 255028*

**BRÚKTUR KØKUR**
bíliga til sølu.
*Tlf. 422656 ella 515058*

**BÍLIGT!**
Ein koyriklárur nitrobilur við radiostýring.
*Tlf. 220955*

**NOKIA 8210**
Lítið brúkt fartelefon í sera góðum standi, virkar perfekt. við ladara einans 1000 kr.
*Tlf. 314587*

**OMEGA LUMMAUR**
Orginalt Omega Grand Prix 1900 ur, við leður lumma. Silvur við gull legering. stødd Ø 52 mm H 15,5 mm. Kassa nr. 6177038, urverk nr. 5395096. Perfekt til føroyska búnan. 2.500 kr.
*Tlf. 314587*

**NIKON COOLPIX 3500**
Lítið brúkt kamera, 3,2M pixel við ladara, 64MB Compact Flash og nýtt battarí. Í sera góðum standi, virkar perfekt. 2300 kr.
*Tlf. 314587*

Lýsið við brúktum bilum
Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 994, Sp/f Chr. Dahl Restorff & Synir, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Martin Christian Restorff, Bóndabrekka 27, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Martin Wilhelm Restorff, Fjósagøta 16B, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 6. september 2004

Kristin Balle

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

# Summarferian gevur hug til rúsevni



*Føroyska rúsevnisløgreglan heldur, at nýtslan av sterkum rúsevnini sum amfetamin økist í stórum kring landið. Hesa rúsevni verða millum annað brúkt á stórum techno-veitslum uttanlands og eru eisini komin til Føroya*

**Formaðurin í Fyribyrgingarráðnum heldur, at ungfólk fáa smak fyri sterkum rúsevnum á ferðum uttanlands. Rúsevnisløgreglan heldur, at sterk rúsevni í stórum tali finnast kring landið**

RÚSEVNI
*Eyðun Klakstein*

Tá ið føroysk ungfólk koma heim av ferðum uttanlands, hava tey hugin at royna sterk rúsevni við í viðførinum.

– Uttanlands er tað vanligt við sonevndum techno-veitslum, har tey taka speed-tablettir. Eg havi ein varhuga av, at føroyingar royna hesar veitslur uttanlands og fáa á tann hátt smak fyri amfetamin og líknandi rúsevnum.

Tað sigur Heðin Thomsen, sum er formaður í Fyribyrgingarráðnum.

Føroyska rúsevnisløgreglan heldur, at nýtslan av sterkum rúsevnini økist í stórum.

– Seinastu tveir mánaðirnar hava vit eisini sæð, at hørð evni sum amfetamin eru nógv útbreidd, og tað er ikki bara í Havn. Tey eru um meginpartin av landinum, segði rúsevnisløgreglan við Dimmalætting leygardagin.

## Frá meting til fakta

Formaðurin í Fyribyrgingarráðnum heldur, at her er talan um eina meting hjá løgregluni, men at tað er neyðugt við at fáa betur hagtalstilfar til vega.

– Føroyingar mangla eina skráseting av fólki, sum eru í viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu. Hesa skráseting hava tey alla aðra staðni, men ikki í Føroyum.

Tí kunnu vit bara meta um, hvussu gongdin er í misnýtsluni her á landi, og hvørji evni verða misnýtt, sigur Heðin Thomsen.

Heðin Thomsen heldur, at hendan gongdin við teimum sterku rúsevnunum er óheppin, og neyðugt er at arbeiða á fleiri frontum.

– Politiið skal seta neyðugu orkuna av til at steðga innflutninginum og útbreiðsluni, men vit mugu eisini fáa hagtøl til veg fyri at fylgja gongdini. Og so ræður eisini um at upplýsa ungdómin um vandarnar, og tað verður gjørt, sigur Heðin Thomsen, formaður í Fyribyrgingarráðnum.

# Hassj og stuldur

Tíðliga leygarmorgunin varð ein bilur stolin í Berjabrekku. Teir tríggir menninir, sum stóðu aftanfyri stuldurin, komu tó ikki langt í bilinum, tí løtu seinni rendu teir á ein annan bil í Berjabrekku. Allir tríggir menninir, sum vóru ávirkaðir av rúsdrekka, eru tiknir inn til avhoyringar. Førarin var 18 ár og hevði ikki koyrikort.

Um vikuskiftið varð hassj funnið umborð á grønlendska trolaranum Regina C., sum liggur við vestaru bryggju. 40 gramm av ólógliga evninum varð funnið. Ongin er skuldsettur í málinum.

Ein kvinna var leygarkvøldið ákoyrd í gonguteiginum við Niels Winthers gøtu. Løgreglan veit, hvør koyrdi bilin, og tær neyðugu kanningarnar eru gjørdar.

Ein stuldur varð framdur leygardagin á parkeringsøkinum hjá SMS. Tá førarin kom aftur til bilin, varð teldan hjá honum horvin. Løgreglan kannar málið.

**-hkm**



# HEILSANIR



**Til Ester og Hallur**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúðleypsdegnum í dag og takk fyri eitt sera hugnaligt kvøld 28. aug.
**Heilsan vit norðanfjørðs**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Heilsan frá okkum
**Bergur**



**Góða Maud**
Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Her hevur tú onkuntíð sitið gott.
**Heilsan A. og P. »gúlla«**



**Góða Begga**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum 7. sept.
**Ynskja Ása og Torgerð**



**Góða lítla Jona**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Vit elska teg.
**Ynskja omma og abbi undir Brúnni**



**Góða Jóna Elisabeth**
Hendan lítla prinsessan fyllir 1 ár í dag. Hjartaliga tillukku. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Omma og abbi á Norðasta horni**



**Góða Jónvør**
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum.
**Heilsan mamma, babba og systkini**



**Góða elskaða Marjun**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Ynskja mamma, babba og Rebekka**



**Góða fitta elskaða Jona**
Hjartalig atillukku við 1 ára degnum.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag
**Ynskja Birna, Arthur og Janus**



**Góði Kristian**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum í dag. Vit elska teg.
**Mamma og babba**



**Allarbesta omma**
Hjartaliga tillukku við degnum 8. sep. Alt tað besta í framtíðini. Eisini ein heilsan til abba
**Ynskja vit í Álandi**



**Góða mostir**
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum. Muss og klemm frá
**Jan Kristjan og Sveina**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..................................................................
Bústaður: .............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«